# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Katrin Højsted | Flokkur: 3.B | Skúlaár: 2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein: Kristni | | |
| Tímar: 2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið: Hoyra bíbilsøgur úr bæði GT og NT. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið: At næmingarnir gerast kunnugir við okkara kristnu trúgv og mentan.<br>Dentur verður lagdur á Jesu lív og boðan, tey fyrstu kristnu og menniskjuligar meginspurningar, sum altíð eru aktuellir og kunnu setast inn í okkara dagligdag. | | |
| Arbeiðsháttur: Lær. sigur frá og samtala verður um frásøgnina. Hendingarnar verða settar inn í okkara daglidag.<br>Næm. loysa lættar uppgávur, sum hava við tekstin at gera ella tekna eitthvørt.<br>Læra sangir og sálmar við at syngja teir, eisini fáa næm. sálmavers fyri heima at læra uttanat.<br>Av og á eru spurnarkappingar, drama o.l. | | |
| Tilfar og amboð: Bíblian, Barnabíblia, sálmabókin, sunnudagsskúlasangir. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: Tikið verður afturíaftur fyri at síggja, um nakað liggur eftir m.a. spurnarkappingar. | | |
| Latin inn: 10. sep. 2009 | Undirskrift lærarans: Katrin Højsted | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Margretha Bjarnastein | Flokkur:<br>3. B | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Føroyskt

Tímar:
9 tímar um vikuna í 4 dagar.

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Lesing
Skriving
Mállæra-málmenning

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Lesing:
Mál okkara er at gerast uppaftur betri lesarar - lesa skjótari, fata innihald og at duga at greiða frá tí, vit hava lisið.

Skriving:
Vit menna fagurskriftina, okkara skrivaðu søgur eru betur uppsettar, og vit skriva fyrisagnir at bøta um stavsetingina.

Málmenning:
Lærari og næmingar tosa saman dagliga, og vit leggja dent á at vera greið í orð og tal, brúka føroysk orð og at benda rætt.

Mállæra:
Í 3. flokki arbeiða vit við navnorðum - eintal og fleirtal og kyn - og eitt sindur av fallbendingum;
og vit læra sagnorð - navnhátt, nútíð og tátíð.

Arbeiðsháttur:
Lesing:
Vit lesa hvønn dag - kendan og ókendan tekst; loysa uppgávur til lisna tekstin, hvør sær ella saman við læraranum.
Vit loysa skrivligar uppgávur, sum styrkja lesing, stavseting og fatan.
Lesiskeið ( frílestur í u.l. 1 viku ) taka vit 3 ella 4 ferðir í skúlaárinum.

Skriving:
Vit skriva í skrivihefti, uppgávubøkur o.a.

Málmenning, mállæra:
Í skrivaðu søgunum leggja vit meiri dent á, at næm. gerast greiðari í síni frásøgn - byrjan, innihald,endi;
og eisini skulu bendingar og endingar vera rættar.

Heimaarbeiði er til hvønn dag, sí heimasetning.

| |
|---|
| Tilfar og amboð:<br>Hervør og Høgni í triðja + uppgávuhefti 1 og 2<br>Lesibók til 3.skúlaár 1.partur<br>Betri handskrift<br>Firvaldsbók 4 og 5 ( uppgávur og mállæra )<br>Skrivihefti<br>Frílesingsbøkur |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Vit eftirmeta dagliga í skúlanum<br>Lesiroyndir verða tiknar í des. og mai ( dato er við fyrivarni ) |

| | |
|---|---|
| Latin inn:<br>10. september 2009 | Undirskrift lærarans:<br>Margretha Bjarnastein |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>HL | Flokkur:<br>3.b | Skúlaár:<br>09/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Støddfrøði | | |
| Tímar:<br>6 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br><br>Halda áfram við teimum trimum roknihættunum, samanlegging, frádrátturog falding.<br>Byrja verður at falda við tveimum tølum<br>Byrja at bíta<br>Duga at lesa uppgávur og at loysa tær | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br><br>Geva næmingunum fimi í talviðgerð.<br>Geva næmingunum grundleggjandi í talviðgerðog støddfrøðiðigum hugtøkum.<br>At læra næmingin at arbeiða sjálvstøðugt.<br>Næmingarnir skulu vera fyrireiaðir til at koma í 4. fl. har tað ikki longur eru eingangsheftir. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Felags undirvísing frá talvuni. Samtala millum lærara og næmingar.<br>Arbeitt verður einsæris, har lærarin hjálpir til tá ástendur.<br>Eykabløð til teir fimastu næmingarnar. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Øll vanlig rokniamboð.<br>Sigma 3A og 3B<br>Eykabløð sum eru roknað til 3.fl.<br>Avritsíður úr " Matematikbogen " | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmett verður við jøvnum millumbilum, við eykabløðum og avrits. úr "MB"<br>Í vár er so RM3 roynd. | | |
| Latin inn:<br>12.09.09 | Undirskrift lærarans:<br>Hans J. Lamhauge | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Jónsvein Simonsen | Flokkur:<br>3. b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Sang og Tónleikur | | |
| Tímar:<br>Ein tíma um vikuna | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Sangur<br>Rútmur(klappa til sangirnar)<br>Nótar | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Stóra útboðið av fløgum og tónleiki annars, hevur við sær, at tónleikur er vanligur og nógv nýttur í gerandisdegnum. Næmingarnir kunnu tískil hava ta fatan av tónleiki sum brúkarakent, óvirki fyribrigdi. Tí vil ein partur av undirvísingini verða at fáa næmingarnar at opna eygu og oyru fyri musikalskari dygd, fáa sanggleðina at spretta, samstundis sum teir kunnu ogna sær nakað av grundleggjandi vitan um tað musikalska skriftmálið (nótar og rútmur..) | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Vanliga spæli eg guitar ella keyboard og børnini syngja.<br>Hendinga ferð spælir onkur næmingur á guitar.<br>Nøkur orf- instrumentir eru eisini tøk á skúlanum.<br><br>Roynt verður at menna næmingarnar sangtekniskt: syngja spakuliga, hart, gera langar tónar, stuttar tónar, syngja høgt/lágt. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Mest verður sungið úr heftinum, sum vit hava gjørt til " tey smáu", t.v.s. 1.2. og 3. flokk á Glyvrum.<br>Hetta er ein góð blanding av sálmum og sangum av ymiskum sløgum, sum vit hava valt og halda eru hóskandi til hendan aldursbólk.<br><br>Orf instrumentir | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Regluliga verður eftirmett í samskifti við næmingarnar | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>Jónsvein Simonsen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Katrina Maria Vang (SV) | Flokkur:<br>3.b. | Skúlaár:<br>2009/2010 |
| Lærugrein:<br>Handarbeiði/evning | | |
| Tímar:<br>2 tími um vikuna | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Byggja perlur, knýta, brodera, arbeiða við ull, tilfar úr náttúruni, trølladeiggj, klippa, líma | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Málið er at menna skapandi evni næminganna. Somuleiðis at tey læra at tekna frítt, brúka hugflogið. At klippa, mála og líma ymiskt sum mennir motorikkin er av stórum týdningi. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Eg greiði frá áðrenn vit byrja. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Ull, tógv, toy, lím, máling, perlur og ymiskt ú náttúruni. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmeting av arbeiðinum, verður gjørd. | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>K. M. Vang | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Katrin Højsted | Flokkur: 3.B | Skúlaár: 2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein: Heimstaðarlæra | | |
| Tímar: 2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið: Lesa, kanna, finna upplýsingar, loysa uppgávur, samtala, bera saman, fáa størri fatan av okkum og umheiminum og føroyar nú í mun til fyrr. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið: At næmingarnir læra um oyggjarnar, bygdirnar og fjøllini. Eitt sindur um Norðurlond, Veraldarpartarnar og veraldarhøvini. Nakað um veðurlag, jørðina, rúmdina og mánan. Kost og heilsu, náttúru og umhvørvisvernd. Bera saman samfelagið fyrr og nú. Fáa størri fatan av sær sjálvum í mun til umheimin. | | |
| Arbeiðsháttur: Lesa ymiskt og práta út frá tí lisna og tað sum næm. sjálvir hava uppliva og kenna til.<br>Finna upplýsingar á einum korti, møguliga á alnótini og í ymiskum bókum. Fara út og kanna ymiskt og spyrja ymisk heimildarfólk. | | |
| Tilfar og amboð: Grundbókin er Vatnið og Føroyakortið,<br>Kort yvir norðurlond og heimsatlas. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: Tikið verður afturíaftur fyri at síggja, um nakað liggur eftir m.a. spurnarkappingar. | | |
| Latin inn: 10. sep. 2009 | Undirskrift lærarans: Katrin Højsted | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Guðrun Malena Hansen | Flokkur:<br>3.AB Itrótt Gentur | Skúlaár:<br>2009/10 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Ítróttur

Tímar:
2 tímar um vikuna

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
At varðveita, vekja og menna skapandi evni næmingana.
at bøta um hugin at røra seg og at fara væl við sær
At kunna næmingarnar um tann týdning, ítróttin hevur
At vísa næmingunum á fjølbroyttar rørslumøguleikar

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Likamliga rørslu sum mál, vit skipað so fyri at øll kunna vera við

Arbeiðsháttur:
Rørsla sum samskifti og rørsla eftir tónleiki
Skipað spæl
Rørsla sum samskiftismiðil og rørsla eftir tónleiki
Stev stiggongd, dansispøl
Íðkan við bandi, bólti og gjørð
Íðkan á máttu
Klíva og hanga
Javnvágsíðkan
Spøl, bóltspøl, samarbeiði og reglar.
Grundíðkan til frælsan ítrótt innan og uttandura
Skreiða
Lop
Amboðsfimleikur

Tilfar og amboð:

Vit eru í fimleikarhøllini á Glyvrum, og har verður alt tilfar brúkt sum er í høllini

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Jónsvein Simonsen | Flokkur:<br>3. b dreingir | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Fimleikur | | |
| Tímar:<br>2 tímar Fjúrtanda hvønn dag | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið: | | |

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:

Bóltspøl
Frælsur ítróttur
Reiðsskapsfimleikur
Koordinatiónsvenjingar
Ymisk spøl.

Bóltspøl: Fáa eina venjing í at spæla bóltspøl, tvs. tilvenjin ella fyrireiking til sjálvt spælið.
Frælsur ítróttur: Móti vári er laga manni at fara útum og royna eitt sindur av hesum ítrótti.
Reiðsskapsfimleikur: Málið við reiðsskapsfimleikinum er at styrkja motorikkin hjá næmingunum.
Koordinatiónsvenjingar: Rennivenjingar, halda eina javnvág.

Arbeiðsháttur:
Bóltspøl: Her verða gjørdar tilvenjingar, sum júst eru ætlaðar tí einstøka spælinum.

Frælsur Ítróttur: Næmingarnir læra at halda reiðsskapinum rætt. Longdarlop, 100-200 metra renning

Reiðsskaps fimleikur: Arbeiða við balansuni og motorikkinum hjá næmingunum. Hest,bukk, lopfjøl, ringum,togum og máttum.

Tilfar og amboð:
Øll amboð, sum eru tøk í fimleikarhøllini.

| |
|---|
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmett verður regluliga í samskifti við næmingarnar. |

| | |
|---|---|
| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>Jónsvein Simonsen. |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Jónsvein Simonsen | Flokkur:<br>3.b dreingir | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Svimjing

Tímar:
Tveir tímar fjúrtanda hvønn dag

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Crawl
Bringusvimjing
Andingin
Teknik

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:

Crawl: Læra beintakið og at nýta armarnar rætt, fáa andingina uppá pláss.

Bringusvimjing: Læra at brúka armar og bein rætt

Ryggsvimjing: Læra at flóta rætt á rygginum og fáa samljóð millum armar og bein.

Endamálið við svimjing og ítrótti sum heild er, at næmingarnir skulu røra seg og fáa ta fatan, at tað er gott og týdningarmikið at venja likamið regluliga.
Í svimjingini skulu teir føla seg tryggar í vatninum

Dentur verður lagdur á persónligt reinføri, serliga áðrenn næmingarnir fara út í hylin.

Arbeiðsháttur:
Crawl:
læra at anda rætt, upp at anda við triðja hvørt tak, her er plátan ein hentur lutur í venjingini.

Bringusvimjing:
Sita á kantinum og venja beintak og armtak, áðrenn farið verður í hylin.

Ryggsvimjing:
Læra at flóta á rygginum. Pláta verður nýtt. Læra at nýta armarnar. Byrja í mylluformi, sum seinni kemur til at strekkja seg eftir takinum.

Kava av kantinum.

<table>
<tr><td colspan="2">Tilfar og amboð:<br>Flestu tilvenjingarnar verða gjørdar við plátu<br><br>Øll tey svimjiamboð, sum eru tøk í høllini</td></tr>
<tr><td colspan="2">Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmetingin verður regluliga í samskifti við næmingin sjálvan.<br>Fara at taka svimjiroyndirnar vatnmerkið o.a.</td></tr>
<tr><td>Latin inn:</td><td>Undirskrift lærarans:<br>Jónsvein Simonsen</td></tr>
</table>

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Pálin Olsen | Flokkur:<br>3.ab gentur | Skúlaár:<br>2009/2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Svimjing | | |
| Tímar:<br>2 tímar 2. hvørja viku | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>1. at flóta/svimjistøða<br>2. at glíða<br>3.bjarging | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>1 og 2. Málið er at næmingarnir við árslok megna tað, sum svarar til Skjaldbøku- og Pingvinmerkið í Merkjaskipanini hjá Svimjisambandið Føroya. Tvs. at næmingarnir við árslok duga at flóta á ryggi og á búki og at glíða ígjøgnum vatnið í svimjistøðu.<br>3. Næmingarnir læra tríggjar tær fyrstu grundreglurnar í bjarging. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Arbeiðshátturin er uppdagandi og spælandi. Næmingarnir fáa felags venjingar, sum teir loysa á tí støði, teir eru á. Hædd verður tikið fyri, at næmingarnir eru á ymsum støði.<br>Tímarnir verða skipaðir við upphiting, venjingum, og felags spæli. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Øll undirvísingin fer fram í svimjihylinum á Toftum. Tifarið, sum verður brúkt, eru leikur og amboð, sum eru til taks í høllini, og sum stuðla undir ymsu venjingarnar. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmett verður saman við læraranum, sum hevur flokkin í fim.leiki | | |
| Latin inn:<br>6. sept 2009 | Undirskrift lærarans:<br>Pálin Olsen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Katrin Højsted | Flokkur: 3.B | Skúlaár: 2009/10 |
| --- | --- | --- |
| Lærugrein: Danskt | | |
| Tímar: 3 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið: Lesing, frílesing, skriving, uppgávur, sangir, spøl, samtala, lær. lesur fyri o.l. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið: At næmingarnir læra at lesa, skilja, tosa, skriva, hoyra og fata danskt mál. | | |
| Arbeiðsháttur: Næmingarnir fáa fyri heima og lesa hart upp í flokkinum, tosa verður um ljóð. Samtala verður um tað lisnað á donskum, lær. skrivar ein setning á talvuna, sum hevur við innihaldið á tí lisna at gera, síðani skriva næm. í heftið og tekna eina mynd sum hóskar til.<br>Arbeitt verður við lættari skrivligum uppgávum í "Ny SKRIFTLIGT for anden"<br>Sungnir verða lættir da sangir. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Søren og Mette bøkurnar eru lesibøkur<br>Ny SKRIFTLIGT for anden til lættari skrivligar uppgávur.<br>Lættar frílesing bøkur av bókasavninum.<br>Skriviheftið til skriving og tekning.<br>Ymiskir sangir t.d. Jep han har en elefant og<br>Se den lille kattekilling.<br>Lær. lesur lættar søgur upp úr: Hvad var det jeg læste? og kend ævintýr á donskum. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: Næm. lesa ókendan tekst av og fyri at síggja , um framgongd er. | | |
| Latin inn: 10. sep. 2009 | Undirskrift lærarans: Katrin Højsted | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Katrin Højsted | Flokkur: 3.B | Skúlaár: 2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein: Heimkunnleiki | | |
| Tímar: 2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið: Amboð, útbúnaður, reingerð, reinføri og borðreiðing. Kostur og heilsa. Arbeiðshættir, bakstur, steikja og kóka. Hagreiðing av ymiskum mati. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið: At næm. gerast kunnugir við alla vanliga matger, reinføri, tryggleika og ábyrgd. Læra at arbeiða saman í bólki og geva hvørjumøðrum pláss. | | |
| Arbeiðsháttur: Lær. gjøgnumgongur uppskrifina. Næm. fáa sær fyriklæði og vaska sær um hendurnar og finna tilfarið fram. Tey býta uppgávurnar ímillum sín, lær. fylgir við, hjálpir, stuðlar og vegleiðir. Síðani verður ruddað av, vaskað upp og borðreitt. At enda verður tikið av borðinum, vaskað upp, vaskað borð og feiða. Rein viskistykki, handklæði og lappar verða løgd fram. | | |
| Tilfar og amboð: Lættar uppskriftir, sum eru lagaðar til næmingarnar. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: Práta verður um, hvussu gongur í teimum ymisku bólkunum og hjá hvørjum einstøkum. | | |
| Latin inn: 10. sep. 2009 | Undirskrift lærarans: Katrin Højsted | |